

www.oljan.fo

**Jan Müller** 29 - 09 - 2011

# Framvegis turt hjá Cairn

Nógv bendir nú á, at skotska oljufelagið Cairn Energy verður noytt at sanna, at hóast boringar í tvey ár, hevur felagið hvørki funnið olju ella gass í grønlendsku undirgrundini enn. Í hvussu er hevur felagið kunngjørt í dag, at royndarboringarnar í tí sokallaða Napariaq-blokkinum einar 215 fjórðingar vestur úr Aasiaat eru endaðar úrslitaleysar. -Boripallurin Leiv Eiriksson, sum hevur borað á 293 metra dýpi í Napariaq í summar, er givin, og brunnurin er tettur, skrivar Cairn á einari fráboðan í dag. Sagt verður, at pallurin boraði niður á 2.977 metra dýpi, men at har var einki tekin um nakað kolvetni. Boritíðin í Grønlandi fer at styttast fyri í ár, men Cairn Energy vónar, at Leiv Eiriksson, sum nú er á veg suðureftir, kann taka uppaftur boringina, sum hann gjørdi á Atammik-blokkinum fyrr í ár. Tann boringin steðgaði, tá Cairn valdi at senda pallin norður á Napariaq-blokkin. Cairn Energy hevur eisini boripallin Ocean Rig Corcovado í Vesturgrønlandi, og hann er nú á veg suðureftir og skal bora Atammik-blokkinum tað, sum eftir er av boritíðini í ár. Atammik-blokkurin er góðar 100 fjórðingar vestan fyri Nuuk.